## Hendrik breyt beinið

Talan var helst um seinasta dystin hjá Hendrik Rubeksen í ár, tá hann týskvøldið fyri fyrstu ferð spældi á B68-liðnum. Í nærdysti við mótstøðumann varð Hendrik skaddur, og mikudagin varð so staðfest, at talan er um beinbrot. Komandi seks vikurnar skal spælarin vera í gipsi, og so er spurningurin, hvørt hann yvir høvur kemur nóg væl fyri seg aftur í ár.

**-mørk**

## Laudrup til Porto

Co Adriaanse hevur longu nú sagt upp venjarastarvið í FC Porto. Hetta tí hann ikki heldur seg hava neyðuga stuðulin frá leiðsluni í felagnum. Millum evnini sum nýggjur venjari hjá felagnum verður danski Michael Laudrup eisinin nevndur. Millum heitastu evnini eru Laudrup tó ikki, og eitt nú gevur Bet365 25 ferðir pengarnar aftur, um veddað verður um, hvørt Laudrup verður nýggjur venjari hjá portugisisku meistarunum.

**-mørk**



# Eitt stig í part í Reykjavík

**Símun Samuelsen, sum í næstu viku kemur heim at spæla landsdyst, og Keflavík eru framvegis næstfremst í Íslandi**

**Fótbóltur**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mikukvøldið í næstu viku fer føroyska landsliðið at spæla fyrsta EM undankappingardystin í hesum umfarinum. Hann verður á heimavølli móti Georgia. Tað er neyvan nakar ivi um, at vágbingurin í Keflavík, Símun Samuelsen, fer at vera ein av teimum ellivu, sum fara at manna føroyska liðið.

Landsliðsvenjarin, Jógvan Martin Olsen, var fyrr í summar í Íslandi, har hann sá Símun hava týðandi leiklut á liðnum hjá Keflavík.

Mikudagin var fyrsti dysturin í 13. umfari í Landsbankadeildini. Dysturin var í Reykjavík, har Símun Samuelsen og Keflavík vitjaðu KR. Úrslitið var 2-2, eftir at Keflavík hevði verið á odda 1-0, og eftir at KR síðani hevði skorað tvey mál, sum bæði vórðu sett í netið við høvdinum.

Útjavnandi málið fekk Keflavík við beinleiðis frísparki, sum varð sent upp um manngarðin og í tann partin av málinum, sum málverjin ikki rakk, tí hann hevði sett sítt álit á, at verjugarðurin skuldi orna paragraffirnar!

Símun Samuelsen var á liðnum hjá Keflavík allar 90 minuttirnar. Næsti dysturin hjá Keflavík verður ikki fyrrenn sunnudagin 20. august. Tað vil siga, at næstu ferð, Símun Samuelsen fer at spæla týdningarmiklan dyst, verður tað landsdysturin á Svangaskarði móti Georgia.

Undan hinum fýra dystunum í 13. umfari í Íslandi, sum verða spældir í kvøld, er Keflavík næstfremst. Teir hava saman við Vali 19 stig. FH er suverent oddalið við 29 stigum. Á fjórða plássi eru Fylkir, Breiðablik og KR við 17 stigum.

## FAKTA

**B36-GÍ 1-1 (1-0)**
**1-0:** Bergur Midjord, 35.
**1-1:** Gunnar Nielsen, 52.
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**B36:** Jákup Mikkelsen – Ásbjørn V. Gunnarsson, Klæmint Matras, Herbert í Lon Jacobsen, Alex Jose Dos Santos – Niels Joensen, Fróði Benjaminsen, Bergur Midjord, Mikkjal Thomassen (Johan Ellingsgaard, 78.) – Amed Davy Sylla (Johan V. Gunnarsson, 87.), Okeke Obele Onyebuchi (Sigurd Carlsen, 87.)
**Gult kort:** Herbert í Lon Jacobsen, Alex Jose Dos Santos, Okeke Obele Onyebuchi, Klæmint Matras
**Reytt kort:** Herbert í Lon Jacobsen (2 gul)
**GÍ:** Geza Turi – Sam Jacobsen, Kaj Ennigarð, Pól Ennigarð, Leivur Hansen (Erling Jacobsen, 63.) – Poul Arni Jacobsen (Jónreid Dalheim, 72.), Símun Louis Jacobsen, Hans Jørgen Djurhuus, Hanus Jacobsen (Jóhan Dávur Højgaard, 83.) – Sverri Jacobsen, Gunnar Nielsen
**Gult kort:** Hanus Jacobsen, Poul Arni Jacobsen, Sverri Jacobsen, Jóhan Dávur Højgaard, Geza Turi
**Reytt kort:** Hans Jørgen Djurhuus (beinleiðis), Sverri Jacobsen (2 gul)

**B68-NSÍ 1-5 (1-2)**
**1-0:** Julian Johnsson 8.
**1-1:** Óli Hansen 30.
**1-2:** Óli Hansen 44.
**1-3:** Sonni L. Petersen 49.
**1-4:** Christian Høgni Jacobsen 61.
**1-5:** Viggo Johannesen 63.
**Dómari:** Lassin Isaksen
**B68:** Tórður Thomsen – Alex Troleis (Ovi Magnussen, 73.), Arnbjørn Danielsen, Kári Hansen, Jóhan Petur Poulsen – Julian Johnsson, Jann Ingi Petersen, Súni Fríði Barbá, Ralph van Dooren (Alex Castilho, 46.) - Kristian Anton Andreasen, Hendrik Rubeksen (Bogi Petersen, 90.)
**Gult kort:** Hendrik Rubeksen, Súni Fríði Barbá, Julian Johnsson, Kristian Anton Andreasen
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Viggo Johannesen, Pól Thorsteinsson, Iulian Florescu (Einar Hansen, 75.) - Helgi L. Petersen, Bogi Løkin (Jústinus R. Hansen, 63.), Óli Hansen, Andy Olsen – Christian Høgni Jacobsen, Sonni L. Petersen (Thomas Gormsen, 67.)
**Gult kort:** eingin

**ÍF – HB 1-3 (0-0)**
**0-1:** Jákup á Borg, 61.
**0-2:** Rókur av Fløtum Jespersen, 65.
**1-2:** Bartal Eliasen (brotsspark), 67.
**1-3:** Tór-Ingar Akselsen, 85.
**Dómarar:** Lars Müller
**ÍF:** Andras Gange – Áki Petersen, Bartal Eliasen, Símin Eliasen, Fritleif í Lambanum – Amin Fallah (Frank Poulsen, 56.), Tórur Lervig, Høgni Zachariassen, Kristian Soelberg – Hanus Eliasen (Hjalmar Dalbú, 88.), Saric Nenad.
**Á bonkinum uttan at koma inn:** Emil Toftegaard, Rúni Petersen, Árni Petersen.
**Gul kort:** Vagnur M. Mortensen, Mortan úr Hørg
**HB:** Bárður Johannesen – Mortan úr Hørg, Rasmus Nolsøe, Vagnur M. Mortensen, Janus M. Joensen – Jákup á Borg (Páll M. Joensen, 90.), Kári Nielsen, Emil Nolsøe Leivsson (Rókur av F. Jespersen, 60.), Jovan R. Panic – Jóhan Ejvind R. Mouritssen, Rógvi Jacobsen (Tór-Ingar Akselsen, 78.).
**Á bonkinum uttan at koma inn:** Tróndur Vatnhamar, Svenn F. Jacobsen.
**Gul kort:** Høgni Zachariassen, Tórur Lervig

**VB-Skála 0-4 (0-1)**
**0-1:** Bogi Gregersen, 19.
**0-2:** Bogi Gregersen, 55.
**0-3:** Jónhard Frederiksberg, 80.
**0-4:** Jóhan Troest Davidsen, 90.
**Dómari:** Petur Reinert
**VB/Sumba:** Marcin Davids – Karl Lisberg, Sune úr Hørg, Jákup F- Olsen, Julian D. Joensen - Tummas P. Olsen, Evrard Ble, Aco Pandurovic, Dan Djurhuus (Jakob Skaaning, 71.) - Jón K. Poulsen, John Johannesen (Birgir Jørgensen, 62.)
**Gult kort:** Evrard Ble, Julian D. Joensen, Jákup F. Olsen, Dan Djurhuus
**Skála:** Vlada Filipovic – Pætur Dam Jacobsen (Bárður Danielsen, 30.), Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Jóhan Troest Davidsen – Levi Hanssen, Nenad Stankovic, Pauli G. Hansen, Alexandur Johansen (Poul N. Poulsen, 80.) – Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen (Debus Danielsen, 58.)
**Gult kort:** Nenad Stankovic, Bárður Danielsen

## Dómarabókin

| Spælarar | GK | RK | Stig |
|---|---|---|---|
| Ralph van Dooren B68 | 6 | 2 | 12 |
| Hans Jørgen Djurhuus GÍ | 6 | 2 | 12 |
| Mikkjal Thomassen B36 | 8 | 1 | 11 |
| Símun Louis JacobsenGÍ | 7 | 1 | 10 |
| Paul Clapson KÍ | 3 | 2 | 9 |
| Bartal Eliasen ÍF | 9 | 0 | 9 |
| Evrard Ble VB/S | 5 | 1 | 8 |
| Janus M. Joensen HB | 1 | 2 | 7 |
| Hallur Dam Joensen VB/S | 4 | 1 | 7 |
| Alex José dos Santos B36 | 3 | 1 | 6 |
| Tórður Thomsen B68 | 3 | 1 | 6 |
| Óli Hansen NSÍ | 3 | 1 | 6 |
| Dan Djurhuus VB/S | 3 | 1 | 6 |
| Sonni L. Petersen NSÍ | 6 | 0 | 6 |

| Felag | GK | RK | Stig |
|---|---|---|---|
| GÍ | 44 | 7 | 65 |
| B36 | 35 | 5 | 50 |
| B68 | 35 | 5 | 50 |
| VB/S | 34 | 5 | 49 |
| ÍF | 37 | 1 | 40 |
| KÍ | 30 | 3 | 39 |
| NSÍ | 36 | 1 | 39 |
| HB | 26 | 3 | 35 |
| Skála | 17 | 4 | 29 |
| EB/S | 23 | 1 | 26 |

Eitt stig verður latið fyri gult kort. Trý stig verða latin fyri hvørt gult kort

## Máltindurin

**Formula-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 13 |
| Óli Hansen | NSÍ | 9 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 9 |
| Súni Fríði Barbá | B68 | 9 |
| Paul Clapson | KÍ | 8 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 8 |
| Páll M. Joensen | HB | 8 |
| Birgir Jørgensen | VB/S | 7 |
| Jákup á Borg | HB | 7 |
| Arnbjørn Hansen | EB/S | 7 |
| Amed Sylla Davy | B36 | 7 |
| Christian Lundberg | KÍ | 6 |
| Gunnar Nielsen | GÍ | 6 |
| Sorin Anghel | EB/S | 6 |

Besti málskjúttin í Formula-deildini fær eftir kappingarárið handað gylta skógvin frá Adidas

**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 17 | 11 | - | 4 | - | 2 | 44 | 19 | 25 | 37 |
| 2 NSÍ | 17 | 9 | - | 5 | - | 3 | 36 | 20 | 16 | 32 |
| 3 HB | 18 | 9 | - | 5 | - | 4 | 40 | 30 | 10 | 32 |
| 4 B36 | 17 | 8 | - | 6 | - | 3 | 28 | 16 | 12 | 30 |
| 5 KÍ | 18 | 7 | - | 8 | - | 3 | 37 | 24 | 13 | 29 |
| 6 GÍ | 18 | 7 | - | 8 | - | 3 | 24 | 19 | 5 | 29 |
| 7 Skála | 18 | 5 | - | 4 | - | 9 | 21 | 19 | 2 | 19 |
| 8 VB/S | 18 | 3 | - | 3 | - | 12 | 17 | 54 | -37 | 12 |
| 9 B68 | 18 | 2 | - | 4 | - | 12 | 18 | 40 | -22 | 10 |
| 10 ÍF | 17 | 2 | - | 3 | - | 12 | 17 | 41 | -24 | 9 |